# Føroysk bilsøga hjá Auto Service

P/F Auto Service varð stovnað 4 november 2005, tá Eivind av Reyni yvirtók bilvirksemið hjá P/F Meinhardt Arge. Umframt bilumboðini Nissan. Peugeot, Opel og Saab keypti Eivind eisini verkstaðarbygningin við Oyggjarvegin í Havn. Hóast nýtt virki, so hevur P/F Auto Service djúpar røtur í føroyskari bilsøgu. Tað fyrsta Auto Service varð stovnað í 1964 í Gundadali. Tað vóru børnini hjá Óla Arge, sum stovnaðu felagið. Í 1978, flutti Meinhardt Arge virksemið niðan á Háls. Í 1985 yvirtók sonurin Finnbogi felagið, sum helt á til 1993. Finnbogi helt fram við virkseminum í nýstovnaða felagnum P/F Meinhardt Arge. Longu í 1962 kom tann fyrsti Prince Skyline til Føroyar. Prince navnið var broytt til Datsun, sum so seinni varð til Nissan. Í dag umboðar Auto Service, bilmerkini: Nissan, Peugeot, Opel og Saab. Umframt bilasølu hava tey eisini nútímans verkstað og stóra goymslu av eykalutum. Tey leggja stóran dent á, at starvsfólkið fakliga eru dagført, hava tað nýggjastu vitanina og tey bestu amboðini at arbeiða við.






















